FØROYA LØGMAÐUR

Tórshavn, 20. januar 2015

Harra Uttanríkisráðharri,

Eg loyvi mær at vísa til samráðingar millum føroyska og íslendska fiskimálaráðharrarnar um fiskiveiði í føroyskum og íslendskum sjógvi í 2015.

Eg havi skilt, at semja er um fylgjandi

**"Semja**
**millum Ísland og Føroyar**
**um fiskiveiði í íslendskum og føroyskum sjógvi í 2015**

**1. gr.**

Veiðiheimildirnar hjá føroyskum nótaskipum í lodnuvertíðini 2014/2015 og í lodnuvertíðini 2015/2016 verða 30 túsund tons hvørja av vertíðunum, um heildarlodnukvotan er 500 túsund tons ella meir. Er heildarkvotan minni enn 500 túsund tons, verður parturin hjá føroyskum skipum 5% av heildarkvotuni.

Loyvt er føroyskum skipum at landa veiðina til framleiðslu í Íslandi. Verður heildarlodnukvotan minni enn 500 túsund tons, er loyvt at landa til matna uttan fyri Ísland ella at virka til matna um borð á føroyskum verksmiðjuskipum nøgd sum svarar til ¾ av kvotuni hjá føroyskum skipum, sbr. 1. grein. Verður heildarkvotan har aftur ímóti størri enn 500 túsund tons, er ikki loyvt at landa til matna uttan fyri Ísland ella at virka til matna umborð á føroyskum skipum meira enn 2/3 av av føroysku kvotuni, sbr. 1. grein. Eftir 15. februar skal ikki meira enn 1/3 av føroysku kvotuni fara til matna uttan fyri Ísland.

Føroyskum skipum er í lodnuvertíðini 2015/2016 loyvt at veiða upp til 10.000 tons av lodnu í hvørji vertíð í íslendskum búskaparøki við veiðiheimildum, sum eru fingnar við samráðingum millum Føroyar og Grønland.

**2. gr.**

Føroyskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í íslendskum búskaparøki í 2015. Eftir samráðingar við landsstýrið í Føroyum kunnu íslendskir myndugleikar áseta mest loyvda skipatal, sum kunnu veiða samstundis á leiðini.

**3. gr.**

Íslendskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í føroyskum sjógvi í 2015. Tó kunnu ikki fleiri enn 12 skip verða á svartkjaftaveiðu samstundis í føroyskum sjógvi. Føroyar skila sær rætt til at avmarka talið av íslendskum svartkjaftaskipum, um tað gerst ov trongt á fiskileiðunum. Eftir samráðingar við íslendskar myndugleikar kann Føroya landsstýri áseta mest loyvda tal av skipum, sum kunnu veiða samstundis eftir norðhavssild.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

**4. gr.**

Íslendskum skipum er loyvt at veiða upp til 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi í 2015 og at veiða upp til 2.000 tons av sild úr øðrum sildastovni enn várgýtandi norðhavssild.

**5. gr.**

Føroysk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í íslendskum búskaparøki, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri íslendsk skip um reiðskap og fiskileiðir. Íslendsk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í føroyskum sjógvi, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri føroysk skip um reiðskap og fiskileiðir. Skipum, ið veiða eftir svartkjafti, er ikki loyvt at hava reiðskap til botnfiskaveiði um borð.

**6. gr.**

Partarnir skulu fráboða ein lista yvir tey fiskifør, sum ætla at veiða á økjunum hjá hvørjum øðrum. Bert tey fiskiør, sum eru á hesum lista, hava loyvi at veiða á økjunum. Áðrenn fiskiskapurin byrjar, skulu avvarðandi myndugleikar hava boð um navn á skipi saman við øðrum upplýsingum av týdningi. Skipið skal boða frá, tá tað kemur á veiðiøkið, uppgeva knøttstøðu og veiðinøgd, sum er veidd, áðrenn komu á økið, og síðani uppgeva knøttstøðu og veiði hvønn dag. Tá skip fer av veiðiøkinum, skal mett veiða verða givin upp. Nágreiniligari ásetingar um fráboðanir verða ásettar í kunngerð."

Við hávirðing,

Kaj Leo Holm Johannessen